LØGBITI NR. 10

# FÍGGJARLÓGARGONGDIN
# – FRÁ BYRJAN TIL ENDA

LÓGARTÆNASTAN
2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 10**

# Fíggjarlógargongdin – frá byrjan til enda

## Hvat er Fíggjarlógin?

Fíggjarlógin er grundarlag undir virkseminum hjá landinum í einum fíggjarári.

Fíggjarlóg, fíggjarlógaruppseting, játtanarsløg og viðmerkingar eru týðandi amboð hjá Løgtinginum at stýra, ávirka og raðfesta útreiðslur og inntøkur landsins við og eru við til at áseta, hvørjar heimildir, skyldur og hvørja ábyrgd eitt landsstýrisfólk hevur viðvíkjandi umsiting av játtanum.

Fíggjarlógin er eisini týðandi miðil til at kunna almenningin um politiskar avgerðir.

Fíggjarlógin, sum verður samtykt av Løgtinginum, er samanteljing av fleiri hundrað játtanum.

## Tíðargongdin frá játtanarkørmum til grannskoðan av landsroknskapinum

Tað ganga nærum 3 ár frá, at arbeiðið við játtanarkørmum byrjar tíðliga 1. árið, til landsroknskapurin er grannskoðaður seint 3. árið. Hetta endurtekur seg, soleiðis at á hvørjum ári verður arbeitt við roknskapar- og grannskoðanarmálum viðvíkjandi farna ári, játtanareftirliti við nýtslu og eykajáttanaruppskotum í fíggjarárinum og játtanarkørmum og fíggjarlógaruppskoti fyri komandi ár.

| Ár 1 | Ár 2 | Ár 3 |
|---|---|---|
| Játtanarkarmar Fíggjarlóg | Nýtsla Eykajáttanir | Roknskapur Grannskoðan |

## 1. Játtanarkarmar

Byrjað verður í februar við arbeiðnum hjá umsitingini og politisku skipanini av játtanarkørmunum fyri komandi ár. Sambært játtanarskipanini skal uppskot til samtyktar um játtanarkarmar verða lagt fyri Løgtingið innan 1. apríl. Í viðmerkingunum til uppskot til samtyktar eru framskrivingar fyri 5 ár.

Saman við játtanarkørmunum verður løgd Búskaparfrágreiðing I um búskaparstøðuna og útlit, um fíggjarstøðuna í samlaða almenna geiranum, framskrivingarfortreytir, framskrivaðar játtanir og ætlað inntøku- og útreiðslutiltøk.

Vanliga verða játtanarkarmarnir samtyktir í mai.

## 2. Fíggjarlógaruppskot

Byrjað verður við arbeiðnum hjá umsitingini og politisku skipanini av fíggjarlógaruppskotinum beint eftir, at játtanarkarmarnir eru samtyktir, men gongd kemur ikki veruliga á arbeiðið fyrrenn í seinnu helvt av august. Fíggjarlógaruppskotið skal í stóran mun endurspegla samtyktu játtanarkarmarnar. Sambært stýrisskipanini skal uppskot til løgtingsfíggjarlóg verða lagt fyri Løgtingið innan 1. oktober.

Saman við fíggjarlógaruppskotinum verður løgd Búskaparfrágreiðing II um búskaparstøðuna, innihaldið í uppskotinum og játtanareftirlit.

Lógaruppskot um neyðuga fylgilóggávu skulu verða løgd fyri Løgtingið í seinasta lagi samstundis sum fíggjarlógaruppskotið.

## 3. Dagførd fíggjarlóg

Sum onnur løgtingslógaruppskot fær fíggjarlógaruppskotið 3 viðgerðir í Løgtinginum. Eftir fyrstu viðgerð verður tað beint í Fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin hevur fíggjarlógaruppskotið til viðgerðar í góðar 2 mánaðir, áðrenn álit verður skrivað í løgtingsmálinum, og málið fer víðari til 2. og 3. viðgerð í Løgtinginum.

Eftir at fíggjarlógin er samtykt við 3. viðgerð, skal hon verða staðfest av løgmanni og kunngjørd innan árslok, so hon kann fáa gildi 1. januar. Um tað ikki eru útlit til, at fíggjarlógin verður samtykt innan árslok, skal bráðfeingis játtanarlóg verða løgd fyri Løgtingið. Hon heimilar landsstýrinum at hava inntøkur og halda útreiðslur á verandi bundnum virksemisstigi, inntil fíggjarlógin er samtykt. Í tíðarskeiðnum fram til samtyktu fíggjarlógina er ikki loyvt at fara undir nakað nýtt virksemi.

Eftir at fíggjarlógin er samtykt, samanskrivar Fíggjarmálaráðið broytingarnar í Løgtinginum, bæði játtanir og viðmerkingar, og uppruna fíggjarlógaruppskotið í eina dagførda fíggjarlóg.

## 4. Nýtsla og játtanareftirlit

Játtanir, veittar við fíggjarlógini, eru galdandi fyri alt fíggjarárið. Fíggjarárið fylgir kalendaraárinum frá 1. januar til 31. desember. Fyri inntøkujáttanir er galdandi, at játtanarupphæddin er meting av inntøkunum í fíggjarárinum. Fyri útreiðslujáttanir er galdandi, at játtanarupphæddin er loftið fyri, hvat útreiðslurnar kunnu vera í fíggjarárinum.

Hvønn mánað skulu stovnsleiðarar, sum varða av játtan, góðkenna, at nýtslan er í samsvari við játtanina. Um ikki skal tað viðmerkjast. Stjórnarráðini góðkenna hvønn mánað fyri teirra landsstýrisfólkagrein, at heildarnýtslan er í samsvari við samlaðu játtanirnar. Stjórnarráðini viðgera møguligar viðmerkingar um frávik í játtanarnýtslu frá stovnsleiðarum og gera av saman við landsstýrisfólkinum, um neyðugt er við tiltøkum fyri at fáa hetta í rættlag, ella at tørvur er á umbøn um eykajáttan.

## 5. Eykajáttanir

Hóast meginregluna um, at veitt játtan er galdandi fyri alt fíggjarárið, so koma óvæntaðar hendingar fyri, sum hava við sær, at neyðugt verður við játtanarbroyting í fíggjarárinum. Sambært stýrisskipanini kunnu umbønir um eykajáttan verða lagdar fyri Løgtingið við eykajáttanarløgtingslóg.

Við árligum skrivi til stjórnarráðini um eykajáttanir leggur Fíggjarmálaráðið upp til, at 2 umfør eru við eykajáttanum, á vári og á heysti.

## 6. Fíggjarnevndarskjøl og eykafíggjarlóg

Hevur tað skund at fremja játtanarbroyting, kann slík umbøn um eykajáttan við fíggjarnevndarskjali verða løgd fyri Løgtingsins fíggjarnevnd til støðutakan.

Innan 1. desember skal uppskot til eykafíggjarlóg, sum inniheldur samtyktu fíggjarnevndarskjølini í fíggjarárinum, verða lagt fyri Løgtingið. Samtykta eykafíggjarlógin er Løgtingsins góðkenning av samtyktu fíggjarnevndarskjølunum í fíggjarárinum. Eykafíggjarlógin skal verða samtykt innan árslok.

## 7. Ráðførsluskjøl

Eisini er møguligt at venda sær til Fíggjarnevndina við ráðførsluskjali sambært § 24 í Tingskipanini. Ráðførsluskjøl verða nýtt til at ráðføra seg við og fáa undirtøku frá Løgtingsins fíggjarnevnd til játtanarbroytingar, har játtanarupphæddin er óbroytt. Hetta er galdandi í slíkum førum, tá játtan ynskist at verða nýtt øðrvísi, enn upplýst er í kontuheiti og viðmerkingum til játtanina.

## 8. Landsroknskapur

Hóast fíggjarárið endar 31. desember, kunnu rokningar sambært stýriskipanini verða skrásettar upp á gamla árið fram til 1. apríl, men Gjaldstovan hevur við siðvenju framskundað hetta til 15. februar. Bert um størri og týðandi viðurskifti gera seg galdandi, verður skráseting á gamla árið framd eftir 15. februar.

Gjaldstovan ger og setur upp landsroknskapin. Sambært lóg um landsins almenna roknskaparhald skal landsroknskapurin verða lagdur fyri Løgtingið innan 1. juni.

## 9. Grannskoðan av landsroknskapinum

Innan 1. juni skulu landsstýrisfólkini lata Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanar- og roknskapartøl. Landsroknskapurin verður grannskoðaður av Landsgrannskoðanini og nøkrum privatum grannskoðarum. Grannskoðanin ger frágreiðing um grannskoðanina til landsstýrisfólkini at viðmerkja. Endalig niðurstøða frá grannskoðanini verður latin løgtingsgrannskoðarunum innan 1. september. Innan 1. desember skulu løgtingsgrannskoðararnir leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum saman við niðurstøðum og viðmerkingum sínum.